

www.oljan.fo

**Jan Müller** 02 - 12 - 2011

# Europa hungrar eftir gassi

Tørvurin á gassi í ES londunum fer at vaksa nógv komandi árini. Brúkið fer at økjast til 600 milliardir kubikmetrar av gassi um árið komandi 10 árini. Hetta upplýsir orkukommiserurin hjá ES, Guenther Oettinger. Hetta kemur fram um somu tíð sum ES er um at seta eitt nýtt orkukoyrikort í verk, sum røkkur fram til 2050. Tað fer at bera í sær munandi minking av CO2 - við tí endamáli at økja um um lutin hjá varandi orkukeldum í samlaða orkubrúkinum til 80% sammett við tey 10% í dag. Kortini rokna orkuserfrøðingar og stórir gassframleiðarar so sum Statoil við, at londini á europeiska meginlandinum noyðast at økja nógv meira um tess gassnýtslu komandi ártíggjuni, nú Týskaland og møguliga onnur lond við, hava ætlanir um at stongja teirra kjarnorkuverk. Tað fer at skapa ein sera stóran eftirspurning eftir øðrum orkukeldum so sum gassi. Oettinger, sum var á fundi saman við russiska orkumálaráðharranum, Sergei Shmatko, segði, at ES fer at økja innflutningin av russiskum gassi til 150 milliardir kubikmetrar tey næstu 10 árini. Hetta upplýsir Dow Jones. Tann nýggja Nord Stream orkuleiðingin, fyrsta beinleiðis gassrutan úr Ruslandi til Europa, fór undir flutningin av fyrsta gassinum úr Ruslandi til Europa í farna mánað. Annars stendur russiska monopolfyritøkan Gazprom fyri eini verkætlan at leggja enn eina gassleiðing úr Ruslandi til Europa, nevnd South Stream. Bæði í Norra og í Bretlandi verða annars gjørdar stórar útbyggingar av gassfeltum komandi árini. Noreg er sum er ein av teimum størstu útflytarunum av gassi til eitt nú Bretland og europeiska meginlandið. Ì hesum sambandi kann eisini nevnast, at stóru nøgdirnar av gassi, sum liggja í undirgrundini vestan fyri Hetland, ikki so langt frá føroyska markinum, fara at koma til sín rætt um nøkur fá ár. Tað eru Total og DONG, sum standa fyri eini risastórari gassútbygging, ið skal koma tí stóra bretska heimamarknaðinum til góða. Skuldi tað hent, at Statoil og ExxonMobil treffa

við eina risa gasskeldu á førpoyska landgrunninum komandi ár, hvat jarðfrøðingar ikki útihýsa, so stendur ein hungrandi gassmarknaður og bíðar, bæði í Bretlandi og inni á europeiska meginlandinum.